## TILBOÐ UPP Á SKÚLABARNAFLUTNING

Fuglafjarðar kommuna lýsir hervið skúlabarnakoyringina Hellurnar-Oyndarfjørð skúlaárið 2007-2008 leysa frá 20. august 2007 at rokna.

Talan er um flutning av einum næmingi av Hellunum til skúlan í Oyndarfirði og flutningur aftur til Hellurnar eftir skúlatíð.

Tað verður kravt, at tann ella tey, ið átaka sær skúlabarnakoyringina lúka krøv um, at akfarið, ið nýtt verður, skal verða góðkent og skrásett til vinnuligan fólkaflutning, herundir tryggjað til vinnuligan fólkaflutning, og at førarin hevur galdandi koyrikort til vinnuligan fólkaflutning til persónbil ávikavist buss.

Møgulig tilboð, ið skulu verða skrivlig, skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 13. juli 2007 kl. 15.00.**

Nærri upplýsningar um flutningsdagar og tíðir kunnu fáast frá Halli Ellingsgaard, skúlaleiðara við Oyndarfjarðar skúla á telefon 252264.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomin tilboð ella einki at taka.

**Fuglafjørður, tann 20. juni 2007**

**Fuglafjarðar kommuna**

## KUNNGERÐ
### um upplatingartíðir í svimjihøllini og broytan av takstur frá august 2007

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at svimjihøllin er opin soleiðis fyri almenninginum eftir summarfrítíðina 2007:

| | |
|---|---|
| Mánadagar | kl. 19.00-20.00 fyri børnum |
| Mánadagar | kl. 20.00-21.00 fyri vaksnum |
| Hósdagar | kl. 18.00-19.00 foeldrum við børnum |
| Hósdagar | kl. 19.00-20.00 fyri børnum |
| Hósdagar | kl. 20.00-21.00 fyri vaksnum við børnum |
| Hósdagar | kl. 21.00-22.00 fyri vaksnum |
| Leygardagar | kl. 14.00-15.00 fyri foreldrum við børnum |
| Leygardagar | kl. 15.00-17.00 fyri børnum |
| Leygardagar | kl. 17.00-18.00 fyri vaksnum við børnum |
| Leygardagar | kl. 18.00-19.00 fyri vaksnum |

**Kostnaður: børn kr. 10,00 og vaksin kr. 20,00**

Hyljaleiga verður gjørd eftir avtalu við lívbjargararnar. Gjald kr. 400,00 pr. tíma íroknað lívbjargara.

Fuglafjørður, tann 20. juni 2007

**Fuglafjarðar kommuna**
**Mentamálanevndin**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## STARV SUM HAVNASTJÓRI VIÐ FUGLAFJARÐAR HAVN

Starvið sum havnastjóri við Fuglafjarðar havn verður hervið lýst leyst at seta tann **1. august 2007** ella so skjótt sum til ber eftir hetta.

**Starvið:**
Tú kemur at hava dagligu leiðsluna av Fuglafjarðar havn, somuleiðis sum tú eisini í starvinum kemur at átaka tær uppgávur við at marknaðarføra havnina í tøttum samstarvi við havnanevndina og býráðsleiðsluna.

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum skipsførari ella aðra viðkomandi hægri útbúgving og førleika í enskum máli bæði í talu og skrift, somuleiðis sum tú skalt duga at orða teg væl bæði munnliga og skrivliga, hava teldukunnleika og kunnleika til nýmótans leiðsluamboð. Haraftrat skal tú eisini hava hollar leiðsluførleikar frá almennari ella privatari vinnu, og ávísar royndir innan sjóvinnu.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú sum leiðari fært møguleika fyri at menna havnina.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag, somuleiðis verður skrivligur sáttmáli gjørdur partanna millum um arbeiðstreytir vm.

**Starvstreytir:**
Umsøkjarar við royndum innan sjóvinnu hava fyrimun.

Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

**Hevur tú áhuga:**
So ert tú vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Fuglafjarðar býráð, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða ráðnum í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 20. juli 2007 kl. 15.00.**

Fleiri upplýsningar fáast við at venda sær til Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra á telefon 737777 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737702.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum umsóknirnar ella onga at taka.

**Fuglafjørður, tann 20. juni 2007**

**Fuglafjarðar býráð**

Gravarhjálp
Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn
Tel 311723 - 511723 · Fax 321722
www.gravarhjalp.net
Sosialurin 341800

## LÝSING EFTIR MENNINGAR / MENTANARLEIÐARA
***Leiðari fyri mentanar- og menningardeildini.***

Fuglafjarðar býráð hevur tikið avgerð um at seta á stovn eina menningar- og mentanardeild til at taka sær av tí vaksandi talinum av málum innan menning av kommununi og av málum innan skúla- og mentanarøkið. Menningar- og mentanardeildin, sum er deild í býráðsumsitingini, hevur sum høvuðsuppgávu at verða fyrisiting hjá fíggjarnevndini í menningarmálum, somuleiðis sum deildin er fyrisiting hjá mentamálanevnd býráðsins, sum fyrisitir menta- og skúlamál hetta sambært kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu.

**Starvið:**
*Tú kemur at hava dagligu leiðsluna av deildini, sum millum annað kemur at taka sær av:*
- Lokalari vinnumenning og menning av handilsvirk seminum.
- Serligum verkætlanum.
- Røkjan heimasíðu kommununar.
- At verða umsiting hjá mentamálanevndini.
- At umsita tann partin av føroysku skúlalóggávuni hjá mentamálanevndini, ið sambært lóg um fólkaskúla, frítíðarundirvísing og øðrum skúlalógum eru ella verða lagdar til kommununa.
- At hava umsitingarligt eftirlit við stovnum og deildum, og at arbeiða við at samskipa hesar til ein meiri virknan leiklut í lokalsamfelagnum.
- At fyrireika nýggj tiltøk á mentanar- og skúlaøkinum.
- At verða við til at samskipa tiltøk í Mentanarhúsinum í tøttum samstarvi við nevndina fyri Fuglafjarðar sjónleikarafelag.
- At fyriskipa ávís hátíðarhald, vinarbýarsambond og samskipa onnur tiltøk.
- At verða við til at orða tey mentanarpolitisku stevnu miðini hjá Fuglafjarðar kommunu.

**Menningarmøguleikar:**
Vit bjóða eitt spennandi umhvørvi, har deildarleiðarin fær høvi at ávirka møguligar broytingar, ið kunnu ávirka arbeiðsinnihald og –umstøður.

**Arbeiðsviðurskifti:**
Má tola skiftandi arbeiðstíðir og til tíðir stórt arbeiðstrýst.

**Fyrisitingarstøði:**
Deildarleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til býráðsskrivaran.

**Førleikakrøv:**
Persónligir eginleikar, viðkomandi miðallanga útbúgving ella samsvarandi førleikar. Kunnleiki til kommunal viðurskifti og umsiting og innlit í vinnu- og handilsviðurskifti og skúla- og mentamál kunnu geva fyrimun. Krøv verða somuleiðis sett til føroyska rættskriving og málburð bæði í skrift og talu.

**Persónligir eginleikar:**
Framtakshugaður, leiðaraevni, samstarvshugaður, dynamiskur, loyalur, støður, tollyntur vm.

**Lønar- og setanartreytir:**
Verða samsvarandi avtalu við avvarðandi fakfelag.

**Byrjan í starvinum:**
Starvið verður sett **1. september 2007** ella skjótast eftir hetta.

**Fleiri upplýsningar** og møguligir fyrispurningar kunnu verða settir Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737702 ella 737700.

Umsóknir og viðkomandi skjøl verða at senda Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 20. juli 2007 kl. 15.00.**

**Fuglafjørður, tann 20. juni 2007**

**Fuglafjarðar býráð**